FØÐINGAR

14. februar fingu Vanja Ejdesgaard, Eiði og Jónsvein S. Joensen, Norðskáli, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3230 gr.

20. februar fingu Katrin Nielsen og Karsten Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3600 gr.

28. februar fingu Lea Busch Sørensen og Jan Djurholm, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3750 gr.

1. mars fingu Elin Mørkøre og Jent Krüth, Tórshavn, ein son. hann var 56 cm. langur og vigaði 4300 gr.

1. mars fingu Evi Hallursdóttir Jacobsen, Skálabotn og Faber Isaksen, Søldafirði, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3900 gr.

2. mars fingu Maria Jacobsen og Petur Meinhard E. Jacobsen, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3600 gr.

3. mars fingu Myrna og Kristian Jacobsen, Hvannasund, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3500 gr.

4. mars fingu Lív Thomsen og Niels Eli á Kráksteini, Argir, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4050 gr.

4. mars fingu Kristianna Thorkildshøj og Fróði Sigvardsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3350 gr.

4. mars fingu Súsanna Nolsøe og Leif Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3800 gr.

5. mars fingu Unna og Asbjørn Hansen, Toftir, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 4350 gr.

5. mars fingu Diana Johannesen og Jann F. Hansen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3300 gr.

6. mars fingu Frida og Steffan Kunoy, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

6. mars fingu Meibritt og John Mikkelsen, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3900 gr.

ANDLÁT

01. mars
Palle Thomsen, fyrrverandi skræddari, Syðrugøta, 93 ár.

02. mars
Sonja Mortensen, Trongisvágur, 68 ár.

03. mars
Selmar Petersen, ættaður úr Fuglafirði, búsitandi á Argjum, 68 ár.

04. mars
Lena Andreassen, fødd Høgnesen, Norðoyri, 84 ár.
Ellen Louisa Nielsen, vanliga nevnd Ella á Kósini, Klaksvík, 93 ár.

05. mars
Selma Seyer Hansen, vanliga nevnd Duddan, Tórshavn, 68 ár.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 9. mars: Magnus á Stongum, tlf. 423006
Sunnudagin 10. mars: Kári Rasmussen, tlf. 447010

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

TILTØK

Gudstænastur Miðføstu sunnudagur
Kvívík: kl. 17, Petur Martin Rasmussen
Christianskirkjan: kl. 11, sjónvarpsgudst., Niels Pauli Danielsen
Mikladali: kl. 12,
Kunoy: kol. 19, Hans Eiler Hammer
Árnafjørður: kl. 20, Jógvan Friðriksson
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10, *Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Elsa Funding
Æðuvík: kl. 11, Meinhard Bjartalið
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Norðskála kirkja: kl. 12, familjugudst., Bergur D. Joensen
Tjørnuvík: kl. 12, Inga Poulsen Dam
Gjógv: kl. 12 messa,
Funningur: kl. 17, messa v/ Emil Olsen
Norðskála: kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson, kirkjukaffi aftaná
Sørvágur: kl. 12, David Johannesen
Havnar kirkja: kl. 11, Bjarni Bæk
Hvítanes: kl. 11, Sonja Klein
Funningsfjørður: kl. 11, familjugudst. og altarg., Uni Næs. Kl. 18 Jákup R. Hansen
Hellur: kl. 16, alrg., Uni Næs
Elduvík: kl. 20.15, Jákup R. Hansen
Æðuvík: kl. 11,
Søldarfjørður: kl. 17, Meinhard Bjartalið.
Innsavnan til Heimamissiónina
Vágur: kl. 11
Skáli: kl. 11, altarg., Jógvan Friðriksson
Dalur: kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen

Í øllum kirkjum í Eiðis, Sjóvar, Fuglafjarða, Norðoya vestara prestagjaldi gongur talvan fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar. Í Havnar kirkju, Sandoyar og í Vágs prestagjaldi gongur talvan fyri Breyð til heimin.

Sjómanskvinnuringurin í Havn
kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið 11. mars kl. 20.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting (skipað barnaansing). Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Hans Arni Jensen, Leirvík greiðir frá missiónsvirki teirra í Afrika og vísir video.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 Møti har major Gamst talar, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 luttaka Knut Gamst og onnur á møti í Immanuel í Hoyvík.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.
Týsdagin kl. 20 Hornvenjing.
Øll eru vælkomin.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Mánaðarmøtini halda áfram við evninum: *Frelst, frá hvørjum til hvat?*
Sunnukvøldið Frá glætan til ævigt lív í Kristusi. Kl. 21 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Heimasíðan:
www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorarbeiði fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Tom Skaale.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Erling Poulsen, lærara.
Mánadagin kl. 19 í KFUM: Aðalfundur – sí lýsing í lýsingartorginum.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Sjónvarpsmøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti á Brekku 3. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 17: Møti.
Øll eru vælkomin.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit. Hósdag kl. 20 verður Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13
Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ N. J. Thorsell, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Helena Thorsell.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Vestmanna Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Ukrainakvøld við Jórun og Nurlan Malaikev.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Jón Miðberg.
Mánadagin kl. 20 Húsmøti hjá Friðbjørn og Kristu. Telefonandaktin 424 741.

Missiónshúsið, Kollafjarðar
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Hera Kjærbo.
Týsdagin kl. 19 Bíbiltími v/ Hera Kjærbo.

Missiónshúsið í Hvalvík
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Filmurin »sum tjóvur á nátt« verður vístur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónsvikan í Æðuvík
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Martin Restorff Jacobsen.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta við Meinhard Bjartalíð, presti og kl. 19 Møti við John Myllhamar.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Høgna Jóhannesen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Meinigheitshúsið á Skála
Í dag kl. 17 Barnamøti, kl. 20 Møti við Sigrun og Leo Hans Mikkelsen. Ungdómskórið á Strondum syngur.
Sunnudagin kl. 15 Barna- og foreldramøti í kirkjuni við Jónu Thomsen, barnakórið syngur. Kl. 19 Møti við Regin Høgnesen, Streingjakórið syngur. Innsavnan til húsið. Aftaná verður eftirmøti bæði kvøldini. Barnasing undir møtunum.

Karmel, Eiði
Vármøtini halda fram í kvøld kl. 20 Emil Olsen prestur og Ámundur Bertelsen tala.
Menn av Strondum syngja.
Kl. 19.30 verður bønarløta.
Sunnudagin kl. 12 verður lestragudstænasta og sunnudagsskúli. Kl. 19 verður møti, Jógvan Lamhauge og Kjartan Stakksund talar.
Innsavnan til Karmel.
Bønarløta verður kl. 18.30.
Øll eruhjartaliga vælkomin.

Skúlin í Funningsfirði
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti við Thabor-kórinum úr Fuglafirði.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Jórun Eið Johannesen, Jónhild og Gulak syngja.
Sunnudagin kl. 11 Familjugudstænasta við Una Næs, kl. 18 Møti við Jákup R. Hansen, Kristian Petersen syngur.

Elim, Søldafirði
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti, kórið úr Siloa luttekur.

Missiónshúsið, Oyndarfjørður
Sunnudagin kl. 16.30 Møti v/ John Myllhamar, trúboðara. Innsavning.

Gøta
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20, har Regin Høgnesen luttekur.

Lívsins Orð
Evangeliskt møti verður í kvøld kl. 20 við Manskórinum úr Evangeliihúsinum.
Sunnudagin kl. 17 Møti við ymiskum vitnisburðum.
Mánadagin kl. 17 møta Liljurnar. Øll eru vælkomin.

Soli Deo Gloria
Leygardagin kl. 10 Bøn. Kl. 20 Alpha-skeið.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bøn.

Missiónshúsið á Viðareiði
Vikuskiftismøti 8.-10. mars.
Leygardagin kl. 20 talar Niels Jacob Nielsen, trúboðari, Streingjakórið í KFUM & K syngur.
Sunnudagin 10. mars kl. 11 Gudstænasta við lestri, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Niels Jacob Nielsen, Óli Poulsen syngur. Høvið er at geva eina gávu til Heimamissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið, Skopun
Í kvøld kl. 20 venja
Felagskórið og Manskórið.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Lovsangur, kl. 18 Møti, Felagskórið og Manskórið syngja. Innsavnan til húsið.
Týsdagin kl. 20 Bíbliutími.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin í Vági
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Títt orð er sannleiki!

Jóhs. 17,17

Guds orð er sannleiki. Tað er sannleikin um Gud og um okkum menniskju. Okkara kirkja skilir ikki bara boðskapin í Bibliuni sum Guds orð. Men eisini sunnudagsprædikan er Gud orð til okkara. Tað er Guds livandi orð. Tað er Guds livandi orð til tín og til mín í dag. Og at prædika er at nútíðargera Guds frelsusøgn. Tað er at gera Guds frelsu til nútið. Ja, prædikan er Guds orð. Hon rættir okkum Kristus av Guds hond. Orðið kann ikki standa einsamalt. Andin má til og andin ger orð Guds, hin kristna boðskapin aktuellan og viðkomandi. Andin kemur aftrat orðinum – og tað er Guds orð. Hetta geldur Bibliunnar orð eins væl og Guds livandi orð, prædikuna. Hin kristni boðskapurin sum Guds orð skapar í hjarta okkara trúgv, kærleika og vón. Tað vendir ikki tómt aftur, men skapar tað, ið tað nevnir. Andin kemur til orðið og tað er Guds sannførandi og skapandi orð. Vit og skil okkara skilir hetta ikki; men hesin veruleiki kallar okkum til trúgv og álit á Guds orð. Eingin vitskapur kann sannføra okkum um, at tað er so. Her velst um trúgv ella ikki trúgv. Antin virkar orðið trúgv ella forherðing. Hví tað er so, kunnu vit ikki geva nøktandi svar uppá. Tað er dult fyri okkum. Tað er ein Guds loyndardómur. Men vit kunnu bara siga, at tað er givið at trúgva – trúgv er gáva. Og hví so ikki øll trúgva er ein gáta. Tað er ein Guds loyndardómur. Er so Guds orð Guds orð fyri teg? Tað er hetta, alt snýr seg um! Er Guds orð sannleikin fyri teg?
Amen

David Johannesen

TILTØK

Missiónshúsið á Tvøroyri
Missiónsvikan 2002.
Missiónsvikan heldur fram fríggjakvøldið við møti kl. 20 v/ talarum norðanfjørðs.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/ talarum norðanfjørðs, Streingjakórið á Tvøroyri syngur.
Sunnudagin kl. 14 Familjumøti og kl. 18 Møti v/ talarum norðanfjørðs, Porkeris kór syngur.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn hvørt møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Um Gud vil, byrjar missiónsvikan týsdagin 12. mars.

Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.
Øll eru vælkomin.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 11. mars:
kl. 9.45-10.15 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til teppir. Kortspæl, telving og onnur spøl.
kl. 14-18 Tilmelding til døgurðan mikudagin og páskadeguðan fríggjad., tlf. 316491
Andlitsmyndir við Chr. í Geil hevur tikið frá 1900-30 eru at síggja í Tilhaldinum.
Týsdagin 12. mars:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Føðingardagur – Tilhaldið fýra ár. Ársfundur.
kl. 15 Sangur. Almannastjórin vitjar. Speaker corner.
Drekka og lagkøka.
Mikudagin 13. mars:
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur. Várframsýningin í Listaskálanum.
Hósdagin 14. mars:
kl. 10.30-11 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát Brandur Petersen
kl. 15-17 Domino binding
kl. 15-17 Tøtingarhugni í kjallaranum. Ása Hátún og Súsanna í Jákupsstovu
Fríggjadagin 15. mars:
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Páskadeguðri. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

AA-fundir í Havn
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy.
Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

MBF
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102 og t-post:
sigmo@post.olivant.fo
Demenslinjan – er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 – svarar týsdag kl. 18.00-20.00.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Javni
Hoydalsvegur 40
3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Køliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið í Aalborg
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis:
Fríggjadag 17.00-19.00 og Leygarkvøld 23.00-03.00.
Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Viltu tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

BRÚDLEYP

Mikudagin 20. februar *giftust* á Ráðhúsinum í Brørup, Annika Joensen og Hallur Sunleif Joensen, bæði úr Klaksvík.

Í dag, leygardagin kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Jonna Fritsdóttir Olsen, Klaksvík og Jens Heri Bolstad Mortensen, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Í dag, leygardagin kl. 14.00 giftast í Berøa, Saltangará, Joan Sevdal Regnsdóttir og Jaspur Ólavsson Tausen. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru vælkomin til vælkomst á Svangaskarði, Toftir, kl. 20.30.

Leygardagin 16. mars kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Sólbjørg Sivertsen, Hvannasund, og Jákup Dahl Olesen, Hoyvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, eru vælkomin í Listaskálan kl. 19.00.

Leygardagin 23. mars kl. 15.00 giftast í prestagarðinum á Nesi Armgarð Arnbjarnardóttir Thomsen, Havn, og Hans Martin á Regni, Toftir.
Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn 16. mars á tlf. 441217, 227266 ella 220001.

Leygardagin 13. apríl kl. 10.30 giftast í Sjóvar kirkju Bogi Kallsberg, Klaksvík og Meinhild Jacobsen, Kolbeinagjógv. Kl. 13 verður borðhald í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tit, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum verða biðin um at siga frá innan 1. apríl á tlf. 447801, 228227 ella 456040.

GULLBRÚDLEYP

15. mars kunnu hjúnini Palma og Jørleif Solmunde á Kambsdali hátíðarhalda gullbrúdleyp. Tey, sum ynskja at vitja gullbrúðarparið henda dagin eru hjartaliga vælkomin millum kl. 10-14.

PRÓGV

Marin Katrina Frýdal, Hoydalar, hevur á Danmarks Forvaltningshøjskole lokið prógv í Diplomstudiet i offentlig administration.